# tankar um lívið

*Kim Simonsen skrivar*

## Eg og sjálvkensla

*"Carpe diem"*
*Horats*

Ein persónur hevur eitt eg og er eitt eg, um viðkomandi er førur fyri at megna støðu sína og sjálvan seg. Hetta gera vit, tá vit hugsa um støðu okkara, virka og taka av avbjóðingunum, ið støðan bjóðar. Dagliga er hetta at taka sær av teim uppgávum, ið ein hevur, og tá ið vit miðvíst royna at gera ynski okkara til veruleika. Hetta kann eisini vera okkurt vit av reinum vana og handahógv skulu taka okkum av, og tá vit gera tað, nýta vit evni vit hava til taks, t.v.s. okkurt vit hava fastartøkur á, ið aftur krevur, at vit hava tamarhald á okkum sjálvum.

Men tað finst annar máttur enn tamarhald. Vit kunnu verða virkin av øðrum alvi, ið vit ikki hava fult eftirlit við, ið er meiri sum ein ósjónlig orka, sum til dømis kann fáa okkum at gerast opin og hugtikin av heiminum og øðrum menniskjum. Hesin duldi máttur elvir eisini til virkisfýsni, og hevur við sær, at vit dragast ímóti ávísum øki ella ávísum bólkum, persónum, londum o.s.fr. Hetta kemst ikki av vana ella handahógv, tí hesin máttur er ikki merktur av dagligum stríði og strevi, ei heldur av reinum vilja, ella av, at vit hava fult tamarhald á støðuni. Hesin máttur kemur innanifrá, og førir okkum mangan uttan strongd fram at ymiskum lutum, støðum og fólki og fram at einum opinleika, har vit eru upptikin og nærum gloyma okkum sjálvi. Vit eru til í heiminum út frá okkara innastu sjálvkenslu, uttan at hugsa um tað á henda hátt. Mangan siga vit, at vit ikki skulu hugsa so nógv, at tað ikki er gott ella rætt. Sjáldan hoyra vit, at tað ikki er gott at hugsa ov lítið, tí tað er mangan tann størsti feilurin í lívinum. Í veruleikanum er tað fólk helst meina, ikki at tað er skeivt at hugsa, men at vit skulu ansa eftir ikki at hugsa skeivar tankar, ið helst eru skaðiligir. Men grava vit longur í hesi tankarøð, so er tað eitt djýpri lendi, ið er tengt at tí dulda mátti innan í okkum, sum fær okkum at gerast virksom, uttan at vera refleksiv og umhugsin allatíðina. Eru vit tað, kunnu vit gloyma at tríva eftir degnum, sum Horats meinti við hugtakinum:"Carpe diem", ið er positiva boðið, at merkja lívið og at dansa meðan lív er, tí sum kvæðið sigur: "...eingin trínur dansin undir moldum".

Tað er sum hesin máttur, henda innasta sjálvkenslan, hevur størri vald og mangan eitt betri árin á okkum, enn reint tamarhald, vani og skylda, ið mangan bert fær okkum at meina, at vit eru til og innast inni vita, at tað eru vit ikki. Tá vit liva í lívførslu, sum ikki er tvingað, uttan sjálvsábreiðslur, sjálvssvik, sjálvsoyðan ella ósunna sjálvshevjan, tá er tað, at vit kunnu tosa um, at vit eru okkum sjálvi. Tá er tað at sjálvgleðin, sjálvtryggleikin bara soleiðis kann koma inn eftir gólvinum á gleðiliga vitjan. Tað er sum týski mystikarin Jakob Bohme sigur:" Teim tíð sum ævinleiki er/ og ævinleiki tíð/ tey fóru frí/ úr feigd og stríð".

Hetta er ein rangvørg orðing, ið er mest sum ein tvørsøgn, ið vil geva eina fatan av okkara royndum at liva, serliga við tíðini. Orðingin kann eisini brúkast í sambandi við sjálvkenslu hins einstaka. Vit liva sum sagt við tveimum háttum av virksemi, tað vanliga og rutinukenda, og so hin ótvingaða frælsa lívkenslan, ið aftur passar saman við gerandiskensluni og lívskensluni. Lívið er torført, og hin størsta listin. Fyri tey flestu er lívið á tremur við skyldum, friðloysi og stríði. Eru vit til út frá okkara sjálvkenslu, eru vit eisini fræls til at vera okkum sjálvi, og í einum grundleggjandi lagi av nøktan, rásarúmi, røring og innara ríkidømi. Stutt sagt merkir ein sjálvt lívið, sum eina undirliggjandi lívkenslu, ið kann vera merkt at lívsmegi og lívsdirvi, t.v.s. einum góðum hugi á lívinum, ið elvir til opinleika og lívsgleði.

## Málbitin

**Støð - staður**
Nú ið brennistøð varð nevnd, er vert at minna á, at í hvørsfalli eitur tað brennistøðar. Tí er tað óbeint at tala og skriva um "brennistaðarmálið", sum so tíðum verður gjørt. Her man hvørsfallið av kallkynsorðinum staður vera fløkt uppí, tí har eitur tað staðar í hvørsfalli. Tað eitur: brennistøðarmálið.

**Vøllur - vørður - høll**
Orðið vøllur hevur í hvør- og hvønnfalli í fleirtali sniðið vøllir og ikki "vallir", sum vanliga sæst í bløðum. Fyri stuttum varð skrivað um "graslíkisvallir", átti at verið graslíkisvøllir. - "Vítt um vøllir gyltir hjálmar syngja", kvøða vit í kendum niðurlag.

Í sama viðfangi er vert at minna á, at vørður somuleiðis eitur vørðir í nevndu føllum í fleirtali. Bókavørður, fleiri bókavørðir.

Men kvennkynsorðið høll eitur hallir í somu føllum í fleirtali. Man skeiva fleirtalssniðið "vallir" vera íkomið við árini frá hesi bending?

**Ljóðføri**
Ofta verður tónatól kallað "ljóðfar", í fleirtali "ljóðfør". Hetta er misfatað. Tað beina er (eitt) ljóðføri, hvørkikynsorð, seinni partur sami sum t.d. í eldføri.

**Uttanlands/uttanlendis**
Av og á hevur verið mint á, at tað eitur uttanlands ella uttanlendis, og at av røttum fær einki itið "uttanlanda". Landið tú ert uttan fyri, er eitt, sama hvussu mong lond tú fert til, og tí er hvørsfalssniðið í hesum føri lands. Uttanlandsskuld er rætta orðið og ikki "uttanlandaskuld". Men millumlandasamráðingar t.d., tí nú eru fleiri lond uppií, og hvørsfallið í fleirtali er landa.

*Úr Orðafari, nr. 2, 1987*

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Turið Mørkøre, morkore@online.no
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Hvør er Ari Behn?

Tað er hósdagur 13. desember, og tær norsku klokkurnar eru støðgaðar upp. Vælumtøkta norska prinsessan, Märtha Louise, hevur almannakunngjørt, at hon fer at gifta seg við rithøvundanum, Ari Behn. Brúdleypið skal standa í Tróndheimi tann 24. mai.

Í mars í ár, tá gitt varð, at Märtha Louise, prinsessa, (30) og Ari Behn (29) høvdu funnið saman, kom verulig gongd á kjakið um framtíðina hjá norska kongshúsinum. Norðmenn vóru skelkaðir. Tað var ilt nokk at svølgja, at norski krónprinsurin hevði funnið sær eina borgarliga einsamalla mammu, hvørs fortíð eftir øllum at døma umfataði brúk av narkotika. Men, hvør er hesin Ari Behn, og hví varð hann so illa sæddur sum komandi limur av tí norska kongshúsinum?

Ari Behn hevur verið nógv frammi í fjølmiðlunum. Í 1999 gav hann út eitt stuttsøgusavn við heitinum »Trist som faen«, sum fekk avbera góð ummæli. Savnið er selt í 64.000 eintøkum, og heitið »Trist som faen«, hevur rithøvundurn tatoverað á økslina. Behn hevur eisini skrivað fleiri aðrar stuttsøgur, sum eru prentaðar í ymiskum tíðarritum. Um árskiftið kemur hann út við nýggjari ritsøgu. Umframt hetta hevur Ari Behn tikist við at skriva filmmanus, og mestu umtalu fekk hann fyri dokumentarfilmin úr Las Vegas, sum varð vístur fyri tveimum árum síðan. Ari Behn luttók sjálvur í filminum, har polskar skøkjur sniffaðu kokain. Sendingin var upprunaliga send fyri sjónvarpskanalina, Metropol, men brot úr filminum vóru send av tí stóru sjónvarpsstovuni, TV 2, mánadagin. Ari Behn er eisini kendur frá náttarlívinum í Oslo, og hann og hansara vinmenn hava verið umtalaðir sum »dørvaktenes skrekk«. Um seg sjálvan skal Ari Behn hava sagt: »Hver dag er en fest, og jeg er et smykke«. Bløðini hava millum annað kallað hann ein »dekadent outsider«.

Tá norski krónprinsurin kunngjørdi, at hann og Mette Marit fóru at gifta seg, vóru nógv, ið gittu, at tað norska kongahúsið fór at rakna. Men í dag hevur krónprinsessan so at siga vunnið øll tey norsku hjørtuni. Ongin tosar longur um hennara fortíð, men heldur er hon vorðin ein lýsandi mynd uppá, at tað ber til at leggja fortíðina aftur um bak og at byrja av nýggjum.

Í dag skriva bløðini sera positivt um trúlovingina millum Märtha Louise og Ari Behn. Á pressufundinum vóru tey so eydnusom, at sjálvt teir hvassastu pennarnir blotnaðu. Ari Behn hevur, eins og Mette Marit, sagt, at hann tekur avstand frá narkotika. »Eins og ein ið skrivar kriminalsøgur ikki nýtist at verða drápsmaður, so nýtist ein ið lýsir umhvørvið, har narkotika verður nýtt, ikki at verða narkotikamisnýtari«, skal hann hava sagt. Á pressufundinum í dag segði Ari Behn, at hann væl kundi hugsað sær at verið heimagangandi pápi. Mette Marit, krúnprinsessa, gjørdi, at tað í Noregi bleiv alment góðkent at vera einsamøll mamma. Kanska Ari Behn førir við sær, at tað verður góðkent, at pápar ganga heima og ansa børnum.

Märtha Louise og Ari Behn fingu í dag gratulasjónir frá øllum teimum politisku flokkunum. Fyrrverandi forsetisráharrin, Jens Stoltenberg, segði í eini samrøðu at: »Ari Behn er et veldig engasjert menneske med egenart. Det er flott at et samfunn kan ha slike mennsker«. Um ikki so langa tíð fer niðurstøðan helst at verða, at Ari Behn var besta valið fyri tað norsku prinsessuna og til gagns fyri tað norska kongahúsið.

Størstur í síni støðd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

**ROYN HENDAN SERA VÆLUMTØKTA BILIN**

Størstur í síni støðd – við størsta dieselmotori – til besta prísin

KIA

**CARNIVAL**
**2.9 Dohc Turbo-Diesel**
**16 V, 126 HK, 5 hurðar**

Familiju - camping - firmabilur- og "minibussur"



Fæst eisini sum vøruvognur




*Multibilurin til einhvørja loysn*

Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.

*3 ára garanti/100.000 km. garanti*




Rætti bilurin til mong endamál. –Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn Tlf. 310600

Sosialurin - 311820

http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Lýsing eftir lærara í donskum til Føroya Handilsskúla á Kambsdali**

**frá 1.jan. til 31. juli 2002**

Søkt verður eftir tímalærara at undirvísa í donskum 3 tímar um vikuna.

**Førleikakrøv**
Hægri útbúgving, handilsháskúla, lærdan háskúla, handilsfaklæraraprógv.

**Setanartreytir**
Sum tímalærari í 2002.

**Løn:**
Í lønarrensli 18/21/26/29/30 ella 16/21/29/31 hjá HL ella eftir avtalu.

**Umsóknarfreist**
Umsóknin skal verða Føroya Handilsskúla á Kambsdali í hendi í seinasta lagi 28. dec. 2001 kl. 12.00. Nærri upplýsingar kunna fáast við at venda sær til deildarstjóran á Kambsdali. Á telefon 220900 aftaná 21. dec. 2001.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Kambsdalur - 530 Fuglafjørður
Tel. 444 900 - Fax 444 901
Teldupost adr: fh@kambsdal.olivant.fo

HESTPRENT



**BØKUR, BØKUR, BØKUR**
og alt annað prent

Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 314 555
fax 318 026
hestprent@hestprent.fo